# Bátastevna fyri tíggjundu ferð

**Fríggjadagin og leygardagin, 20. og 21. mai, verður árliga bátastevnan aftur í Vestmanna. Ágóðin av tiltøkunum fer til liðugtgerð av kappróðrarneystinum**



*Bátastevnan í Vestmanna er hin største av sínum slag í Føroyum, og tað vóru eisini vestmenningar, sum slóðaðu fyri við stevnu av slíkum slag*

Mynd: Vilmund Jacobsen

Vilmund Jacobsen

Bátastevnan í Vestmanna, sum hesaferð verður hin tíggjunda í røðini, verður í ár hildin tveir fylgjandi dagar, nevniliga fríggjadagin 20. og leygardagin 21. mai. Tað eru Vestmanna Ítróttarfelag og Kappróðrarneystið, sum formelt standa aftanfyri stevnuna, og ágóðin fer til liðugtgerð av neystinum.

Skipað verður fyri tiltøkum á keiøkinum og í ítróttarhøllini fyri bæði børnum og vaksnum.

Longu fríggjadagin, sum er dýrabiðidagur, verður stórt barnatiltak við Trøllapæturi og Trøllaommuni.

## Bátar og suppa

Eins og undanfarin ár, verður suppa og annað at fáa leygardagin, tá bátarnir eru komnir av Fútakletti undir Vágalandinum og hava lagt til bryggju í Vestmanna.

**Leygarkvøldið 21. mai verður tann stóri bátastevnudansurin, sum er eitt afturvendandi og vælumtókt tiltak í Ítróttarhøllini í Vestmanna...**

Seinni sama dag verður eisini borðreitt við teimum vælumtóktu bátastevnubúffunum umframt ymiskum øðrum.

Men tað er ikki bara fríggjadagin, at barnatiltøk eru á skránni á bátastevnuni. Soleiðis verður eisini leygardagin, tá barnatiltak við mini-tivoli, fiskibrunni, tombola, andlitsmáling, bóltkasti og øðrum er á skránni.

Hesi tiltøk byrja klokkan 16.

Leygarkvøldið verður so tann stóri bátastevnudansurin, sum er eitt afturvendandi og vælumtókt tiltak í Ítróttarhøllini á festivalinum.

## Kunning á heimasíðu

Úr Vestmanna verður sagt, at tey, sum ætla sær til bygdar við báti ella húsvogni, kunnu lesa á heimasíðuni www.vif.fo um bátapláss og pláss til húsvognar so hvørt, sum bátastevnan nærkast. Her fæst eisini kunning um keyp at atgongumerkjum og annað.

- Vit bjóða øllum áhugaðum vælkomnum á bátastevnu, verður sagt úr Vestmanna.

*vilmund@sosialurin.fo*

†

ANDLÁT

**Alma Tauser,**
fødd Olsen, ættað av Oyrarbakka

andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnumorgunin, 85 ára gomul.

Bønarhald verður í kapellinum á Landssjúkrahúsinum týsdagin kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin kl. 13.00.

***Fyri tey avvarðandi***

***Jóhan, Alexandra, Dánjal og Jóhannes***

Tey, ið vilja minnast Almu, kunnu lata Alzheimarfelagnum eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

†

ANDLÁT

Kæra kona mín og móðir okkara

**Gunhild Petersen**
fyrrverandi sjúkrasystir

andaðist leygarnáttina 5. februar.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju týsdagin 8. februar kl. 13.00.

***Leivur, Kári, Anna Maria og Marjun***

Tey ið vilja minnast Gunhild, kunnu senda Heiminum við Vallalíð eina gávu - konto í peningastovnunum.




*Jens Leon fiskaði fyri 9,6 miljónir krónur í fjør, men á botnlinjuni er úrslitið einki at reypa av, ásannar reiðarin*

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Jens Leon stórt veiðivirði í fjør

Vilmund Jacobsen

Trolbáturin Jens Leon hevur fiskað rættiliga væl, síðan Jónsvein Knudsen keypti bátin og kallaði hann upp eftir pápa sínum, Jens Leon.

- Báturin hevur havt størsta veiðivirði í hesum bólki øll árini, og í fjør var veiðivirðið 9,6 miljónir krónur. Men úrslitið á botnlinjuni er ikki nóg gott. Oljan tyngir raksturin ógvuliga nógv, sigur Jónsvein Knudsen, reiðari.

Vanliga eru 4 og 5 mans við Jens Leon hvønn túrin, og einir 5-6 mans eru knýttir at bátinum.

Skipari er Jóhan Djurhuus av Selatrað.

- Eg keypti bátin í 2006, og eg havi verið sera heppin við fólki. Tað hevur gingið væl at fiska, men tað er botnlinjuni, vit skulu liva av, og hon svarar ikki til veiðivirðið, ásannar reiðarin.

Jónsvein Knudsen vísir á, at í ár er lítið komið burtur úr, tó at hesir bátar ikki hava verið raktir av verkbanninum.

- Veðrið hevur verið stak vánaligt, men vit vóna, at komandi dagarnir fara at roynast, sigur reiðarin í Saltangará.

*vilmund@sosialurin.fo*